# Húsavørður

Annar húsavørðurin hjá okkum hevur fingið nýggjar avbjóðingar og er tí farin úr starvi. Lýst verður tí eftir húsavørði fyri stovnarnar á Debesartrøð til setan 1. oktober ella skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá húsavørðunum eru m.a. at:**

**Bygningar**
- Hava fakligu ábyrgdina av røkt og viðlíkahaldi av bygningunum.
- Verða við til at áseta tær uppgávur, ið byggi- og el-fyritøkur gera fyri stovnarnar, og hava eftirlit við, at uppgávurnar verða gjørdar sum avtalað
- Verða millumliður ímillum stovnarnar og veitarar
- Umsita og loypandi dagføra tekningar og aðrar skrásetingar av installatiónum

**Uttanduraøki**
- Røkja og viðlíkahalda uttandura økini á Debesartrøð
- Rudda kava

**Aðrar uppgávur**
- Hjálpa til, tá serlig tiltøk eru á stovnunum
- Gera annað fyrifallandi húsavarðaarbeiði
- Vera millumliður millum stovnarnar og náttarvaktarskipanir

**Faklig og persónlig krøv**
- Útbúgving sum handverkari, helst innan el-, fínmekanikk- ella maskinøkið
- Hollar starvsroyndir og góðan røkiskap
- Góð samstarvsevni og evni at tosa við fólk

**Fyrimunir**
- Royndir frá líknandi arbeiði
- Gott tekniskt innlit í snikkaraarbeiði, VVS og el-skipanir sum heild
- Teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða:**
- Fjølbroytt húsavarðaarbeiði í samstarvi við annan húsavørð
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

**Løn v.m.**
Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Anniku Sølvará, setursskrivara, á tel. 352504 ella teldupost *annikas@setur.fo*

Umsóknir til starvið við avritum av prógvum, yvirliti yvir royndir og møguligum viðmælum skulu verða Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 17. september.

Stovnarnir á Debesartrøð
Setursskrivstovan
J. C. Svabos gøtu 14 • Postrúm 272 • 110 Tórshavn

TEAM85

Stovnarnir á Debesartrøð, sum húsavørðarnir eru knýttir at, eru: Fiskirannsóknarstovan, Fróðskaparsetrið, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið, Náttúrugripasavnið.

Teir 6 stovnarnir húsast í 13 bygningum, flestu á Debesartrøð.

Tað arbeiða tilsamans umleið 170 fólk á stovnunum

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

---

**DEMMUS HENTZE** landsrættarsakførari | **TURIÐ DEBES HENTZE** advokatur og mediator m.m.c.r.

Tórsgøta 17 - Postboks 236 - FR 110 Tórshavn
Tlf. 311460 Telefaks 311490 E-mail:hentze@hentze.fo
www.hentze.fo

## Hús í Havn til sølu



**Tinghúsvegur 29**

Eini vælrøkt eldri hús í hugnaligum umhvørvi mitt í Havnini.

**Grundøkið:** 156 m2. Eisini er eitt úthús.
**Húsini:** Grundvíddin er 9 x 11 alin. Miðhædd og loftshædd innrættað
**Íbygningur:** Kjallararúm

**Hóskandi boð liggur um 2 mió. kr.**



**Varðabrekka 6**

Útsýnið yvir Havnina fæst ikki betri.

Grundøkið: Grundvíddin 925 m2
Húsini: Uml. 7m x 11 m eru frá 1952. Miðhædd og loftshædd innrættað + hjallur
Kjallari: Ráður.

**Hóskandi boð liggur omanfyri 2 mió. kr.**

*Nærri upplýsingar um húsini og avtala um at síggja húsini fæst við at venda sær til okkara ella á heimasíðuni www.hentze.fo.*

---




## Frá Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag

Útsetti aðalfundurin verður
**mánadagin 3. september kl. 19.30**
í húsum Vágs Matmøðrafelags.

**Eisini verður:**
· Uppstilling til løgtingsvali
· Kirsten Strøm Bech, borgarstjóri kunnar um ellisheimið og ætlanir frameftir.
· Henrik Old, løgtingsmaður, politiska støðan.

Ert tú ungur, fúsur, javnaðaráhugaður kom og ger tína ávirkan.

